# The Rasmus yvirhálar Sibelius



**Megahittið hjá The Rasmus, In the Shadows, er nú tað finska tónleikaverkið, sum hevur selt mest í útlandinum**

Sangurin In The Shadows hjá The Rasmus er nú tann finski sangurin, sum hevur staðið seg best í útlandinum. Megahittið, sum fór sum ein brandur um allan heim, er nú ovast á einum yvirliti hjá felagnum fyri finska komponistar.

Higartil hava tvey verk hjá Sibelius ligið ovast, men The Rasmus er nú farin fram við teimum.

Harvið hevur The Rasmus eisini megnað at havt eitt størri hitt í útlandinum enn Bomfunk MC's hevði við Freestyler, Darude hevði við Sandstorm og HIM hevði við Join Me.

– Hetta er nakað heilt serligt. Eg rokni við, at In The Shadows eisini verður spældur um 100 ár á sama hátt sum violinkonsertir og symfoniir verða spældir í dag, sigur Lauri Ylonen, sangari í The Rasmus.

The Rasmus spælir á Summar Festivalinum í august, og tá verður eisini høvi at hoyra risahittið In The Shadows.

# Samstarv millum Føroyagrunnin og Granskingarráðið

Føroyagrunnurin frá 1971 og Granskingarráðið hava gjørt samstarvsavtalu um umsiting av stuðli til ph.d. verkætlanir innan fiskivinnu.

Eitt av endamálunum hjá Føroyagrunninum er at lata stuðul til lesandi innan fiskivinnu, og framyvir fer grunnurin at lata hendan stuðul til ph.d verkætlanir. Roknað verður við, at grunnurin fíggjar eina nýggja ph.d. verkætlan um árið.

Av tí at upphæddin, sum Føroyagrunnurin hevur tøka til hetta endamál, er lítil, heldur nevndin í grunninum tað ikki verða rætt, at grunnurin átekur sær at lýsa eftir og viðgera umsóknirnar fakliga, men heldur at brúka teir førleikar, sum Granskingarráðið hevur innan hetta økið.

Granskingarráðið fær nógvar umsóknir um stuðul til ph.d. verkætlanir, men hevur ikki møguleika fyri at veita fígging til allar skikkaðar umsóknir. Samstarvsavtalan snýr seg í høvuðsheitinum um, at Granskingarráðið boðar Føroyagrunninum frá ph.d verkætlanum, sum lúka formligu krøvini hjá ráðnum og snúgva seg um fiskivinnu. Síðani viðgerð nevndin í Føroyagrunninum hesar verkætlanir og tekur avgerð um, hvør fær játtað stuðul úr grunninum. Granskingarráðið skrivar sáttmála við játtanarmóttakaran og hevur umsitingarligu ábyrgdina av verkætlanini.

Samstarvsavtalan liggur á heimasíðuni hjá Granskingarráðnum www.gransking.fo.

# Klaksvíkingar spæla á Strondum



Fríggjakvøldið verður konsert í Bygdarhúsinum á Strondum. Tríggir kendir tónleikarar úr Klaksvík fara at syngja og spæla

Hans Hjalti Skaale, Karl Martin Samuelsen og Eyðun Nolsøe fara at syngja og spæla til konsert í Bygdarhúsinum á Strondum fríggjakvøldið.

Hans Hjalti er kendur fyri at syngja tættir, sum hann og Andrias Justesen skriva um alskyns viðurskifti - fólk munnu kenna sangir sum Tubbakstátturin og Sjey drykkjunætur. Tað nýggjasta er ein sangur um Norðoyatunnilin.

Fríggjakvøldið fer Hans Hjalti at spæla til konsert saman við tveimum kendum tónleikarum úr bólkinum Hjarnar – Karl Martin Samuelsen og Eyðun Nolsøe.

Konsertin byrjar fríggjakvøldið kl. 21.00.

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag




Vika 19 2006

# Framhaldandi høgur oljuprísur

MARKNAÐARRÁK

Prísurin á olju er lækkaður seinastu vikuna, og ein tunna av Brent ráolju kostar nú um 70 dollarar. Seinastu tríggjar vikurnar hevur oljuprísurin tríggjar ferðir verið heilt uppi á 75 dollarum. Spurningurin er nú, um lægri prísir munnu vera fyri framman. Tað metir Kaupthing ikki. Vit vænta, at prísurin ikki fer langt niður um 70 dollarar í bræði. Tó so, hann sveiggjar sera nógv, og tí kann hann fara niður um onkran dag. Men seta vit kikaran á teir næstu 2-3 mánaðirnar, vænta vit sum heild ein hægri prís enn í dag. Vit hava áður hugt at oljuprísinum, og orsøkirnar til høgu prísirnar eru enn, at eftirspurningurin er so stórur, samstundis sum møguleikarnir at økja framleiðsluna eru avmarkaðir. Kina hevði bert ein lítlan part av økta eftirspurninginum í fjør. Í ár vænta vit, at millum annað ein økt bilasøla har fer at økja munandi um kinverska eftirspurningin eftir olju. Tá lond sum Iran og Bolivia samstundis nýta oljuna sum eitt politiskt vápn, eru óttin fyri minkandi útboði væl grundaður.

### Lánsbrøv standa í stað

Lánsbrævarenturnar standa framvegis í stað. 10-ára rentan hevur aftur hesa farnu vikuna sveiggjað millum 4,0%-4,1%. Útlit eru fyri, at næsta rørslan í rentunum verður eitt sindur niðureftir.

### Roknskapur frá GN Store Nord

GN store Nord, ið vit meta áhugavert, kunnger roknskap í dag. Kappingarneyti teirra, Plantronics, kunngjørdi í farnu viku ein slakan roknskap. Nú verður spennandi at síggja um hetta var orsakað av lægri eftirspurningi sum heild, ella um GN Store Nord hevur tikið hesar marknaðarpartar frá teimum. Um so er, kann kursurin á GN Store Nord hækka.

### Hesa vikuna

Hesa vikuna fara fíggjarmarknaðirnir at leggja dent á rentufundin hjá amerikanska tjóðbankanum og BTÚ-tøl fyri Evropa. Harumframt fara roknskapir at seta dám á partabrævamarknaðirnar á okkara leiðum.

Donsk 10-ára renta




Vísital fyri norrøn partabrøv




Gjaldoyru

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 586,57 | -1,0% |
| JPY | 5,26 | 0,6% |
| GBP | 1.090,87 | 0,9% |
| NOK | 95,79 | 0,0% |

Íløgufeløg

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 97,63 | 0,0% |
| | | |
| Norrøn Partabrøv | 121,36 | 1,8% |
| | | |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*